Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 20. september 2023
Mál nr.: 23/18680
Málsviðgjørt: BH/OYS

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 65 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 48 frá 26. mars 2002, løgtingslóg nr. 107 frá 20. desember 2002, løgtingslóg nr. 17. frá 20. apríl 2004, løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, løgtingslóg nr. 52 frá 17. mai 2011 og løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2015, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 33. ... *Stk.1-3.* ... *Stk. 4.* Landskassin endurrindar læruplássinum lønina, sum tað hevur goldið lærlingi, meðan hann hevur tikið ta til læruna hoyrandi skúlagongd. Endurgjaldið er 75% av ásettu minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg. *Stk. 5-6.* ...	**1.** § 33, stk. 4, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Endurgjaldið er 60% av ásettu minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag, um arbeiðsloysið er 3,5% ella lægri og 90%, um arbeiðsloysið er omanfyri 3,5%."

	2. Í § 33, verður aftan á stk. 4 sum nýggj stk. sett: "*Stk. 5.* Endurgjaldið verður ásett fyri hvønn einstakan lærusáttmála, tá ið lærusáttmálin verður undirskrivaður og verður síðan støðugt alt sáttmálaskeiðið. *Stk. 6.* Um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur ligið omanfyri 3,5%, verður endurgjaldið sett til 90% av lønarútreiðslunum. Um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, verður endurgjaldið sett til 60% av lønarútreiðslunum." Stk. 5 og 6 verða eftir hetta stk. 7 og 8.